# Vælmøtt til móttøku í Oyndarfirði

**Høvundurin, Freydis Poulsen, signeraði og seldi bøkur við móttøku í Oyndarfirði**



*Høvundurin, Freydis Poulsen, signerar bókina. Undir liðini á henni situr Kári P. Højgaard, býráðslimur í Runavíkar kommunu*

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin, 11. desember, var móttøka kjallaranum hjá Eivindi Petersen, sum hevur handil í Oyndarfirði.

Skipað varð fyri móttøkuni í sambandi við útgávuna av bókini, »Úr Oyndarfjarðar søgu«, sum høvundurin, Freydis Poulsen, hevur skrivað.

Freydis býr í Klaksvík. Mamman var úr Oyndarfirði og pápin úr Svínáum.

Nógv fólk var til móttøkuna, bæði fólk, sum búgva í Oyndarfirði og fólk við tilknýti til bygdina.

### Freydis signeraði

Tað var borgarstjórin í Oyndarfirði, Árni Joensen, sum beyð vælkomin, høvundurin segði nøkur orð, og tað gjørdi Kári P. Højgaard, býráðslimur í Runavíkar kommunu, eisini.

Systir Freydis, Lydia, segði eisini nøkur orð við móttøkuna.

Nakrar gentur spældu á horn, og hetta var tilsamans ein ógvuliga hugnalig løta í Oyndarfirði, har fólk eisini fingu kaffi og køkur.

Við móttøkuna signeraði Freydis Poulsen bókina, og fólk høvdu høvi at keypa sær »Úr Oyndarfjarðar søgu«, heim við.

### Eitt dygdararbeiði

Justinus L. Eidesgaard, sum júst hevur givið út bókina um »Kaj«, var eisini við til móttøkuna í Oyndarfirði.

Hann sigur, at hetta var ein ógvuliga hugnalig løta, men hann hefti seg við, at eingin fjølmiðil var til tiltakið.

– Tað vísir seg bara, at skal mentan sleppa fram at í fjølmiðlunum, skal hendan helst hava eitt ella annað við høvuðsstaðin at gera, og tað er harmiligt.

Justinus sigur, at bókin, »Úr Oyndarfjarðar søgu«, er eitt megnar arbeiði og eitt frálíkt verk.

– Seinastu næturnar havi eg lisið í bólkini. Hetta eru í flestu førum søgur, sum eg áður havi hoyrt, men her hevur so Freydis megnað at savnað tær í frálíkari bók – og við góðum og forvitnisligum myndum, sigur hann.

»Úr Oyndarfjarðar søgu« telir einar 360 blaðsíður og kostar 300 krónur.



*Borgarstjórin í Oyndarfirði, Árni Joensen, bjóðar vælkomin*

# Bjørn Kalsø fegin um nýggja »fiskapakkan«

**– Eg fari sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum at taka hetta málið upp í samgonguni beinanvegin, sigur Bjørn Kalsø**



FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðindafundinum í Fiskimálaráðnum fríggjadagin, fegnaðist landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, um, at Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag nú hava gjørt eitt felags tilmæli um, hvussu tey halda, at ávís viðurskifti á fiskivinnuøkinum eiga at verða skipað.

– Vit hava eftirlýst eini semju um, hvussu eitt nú fiskamarknaðurin í Føroyum skal skipast í framtíðini, og vit hava vónað, at ráfiskaseljarar og ráfiskakeyparar fóru at koma við einum felags tilmæli á hesum øki. Hetta er nú hent, og eg fari sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum at taka hetta málið upp í samgonguni beinanvegin.

Á tíðindafundinum tordi Bjørn Kalsø ikki at lova, at semjan millum feløgini í fiskivinnuni fer at gerast endaliga úrslitið, tá ið saman um kemur, men hann avvísti heldur ikki, at landsstýrið fer at fylgja ynskjunum hjá vinnuni.

– Eg havi eina samgongu aftanfyri meg, sum eg noyðist at taka uppá ráð, og eg havi ikki sæð hesa semjuna fyrr enn í dag. Men eg eri ógvuliga fegin um hetta tilmæli, og eg fari at taka málið upp í samgonguni beinanvegin, segði landsstýrismaðurin.

Síðan feløgini løgdu fram tilmælið á tíðindafundi seinasta fríggjadag, er komið fram, at allir limirnir í Føroya Ráfiskaseljarafelag ikki eru so glaðir fyri alt, sum felt er á blað.

Eitt nú hava Felagið Línuskip og Meginfelag Útróðrarmanna sagt seg ikki taka undir við øllum punktunum í tilmælinum.